# Jólakonsert mikukvøldið kl. 20 í Havnar kirkju



Kristiliga Sangkórið og Kórið hjá Jóhan úr Eysturoynni syngja jólaløg í Dómkirkjuni mikukvøldið 20. desember kl. 20. Meira enn hálva øld hevur Kristiliga Sangkórið havt sum tradition at syngja jólasangir og –sálmar í Havnar kirkju stutt fyri jól. Hetta verður eisini í ár, hesaferð saman við Kórinum hjá Jóhan úr Eysturoynni. Kórini bæði syngja hvør sær og saman, jólaløg úr ymsum londum. Konsertin tekur ein tíma.

# Sangløta í Siloa

Sangbólkurin Salt og Siloakórið fara mikukvøldið at syngja í Siloa í Fuglafirði.

Nógvu tey seinastu árini hevur Siloakórið skipað fyri sangløtu ein av døgunum upp undir jól. Soleiðis verður eisini í ár. Sangløtan verður í Siloa nú mikukvøldið klokkan 20.

Umframt Siloakórið fer sangbólkurin Salt at syngja. Kórið og sangbólkurin eiga umleið hvør sína helvt av skránni. Eisini fer Bárður á Lakjuni at syngja og spæla tvey løg.

Salt syngur síni eyðkendu a capella løg. Hjá Siloakórinum eru tað fleiri, sum spæla undir: Martin Simonsen á urgu, Jóhannus Simonsen klaver, David Simonsen bass, Bárður á Lakjuni floytu og Jóhan á Lakjuni trummur.

Eftir sangløtuna verður bjóðað til ein drekkamunn í Siloa.

# Vilja tálma kommunalu útreiðslurnar

**Landsstýrið fer at taka upp samráðingar við kommunurnar um ein samlaðan útreiðslukarm og um nýggjar roknskaparreglur.**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*– Landið roynir at halda aftur, og kommunurnar mugu eisini gera sítt, siga Bárður Nielsen og Jacob Vestergaard, landsstýrismenn í ávikavist fíggjar – og innlendismálum*

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum og Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum halda, at tíðin nú er búgvin til at fáa tamarhald á útreiðslunum hjá kommunum, umframt at seta í gildi nýggjar roknskaparreglur, fyri á tann hátt at fáa meira gjøgnumskygni í fíggjarviðurskiftini hjá kommunum.

– Seinnu árini hava kommunurnar í Føroyum økt sínar útreiðslur í stórum. Samstundis er greitt, at alt fleiri almennar uppgávur skulu leggjast til kommunurnar at umsita, og tí fáa tær støðugt størri týdning og ávirkan búskaparliga, siga teir báðir í tíðindaskrivi.

Teir greiða víðari frá, at hin samlaði almenni sektorurin hevur ábyrgdina av at tálma sveiggini í búskapinum, og tí fer landsstýrið komandi ár at samráðast við kommunurnar um at fáa í lag ein samlaðan útreiðslukarm.

### Stórur kommunalur vøkstur

Longu nú er greitt, at kommunalu útreiðslurnar vaksa nógv skjótari enn útreiðslurnar hjá landinum. Í ár hava kommunurnar væntandi ein vøkstur í útreiðslunum á í minsta lagi 12 prosent, meðan vøksturin hjá landinum liggur niðri á trimum prosentum, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Hagtøl vísa harumframt, at kommunurnar síðani 2002 hava økt sínar útreiðslur við 7,9 prosentum árliga. Saman um tikið fara kommunurnar at standa fyri 23,7 prosentum av øllum teimum almennu útreiðslunum í ár. Henda gongd er ein av orsøkunum til, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og landsstýrismaðurin í innlendismálum longu nú heita á allar kommunur í landinum um at tálma útreiðsluvøksturin komandi ár.

– Tað liggur á bæði landi og kommunum sum almennir myndugleikar at tálma sveiggini í búskapinum. Tí mugu vit ansa væl eftir, at vit ikki eru við til at seta ov nógva ferð á. Landið roynir at halda aftur, og kommunurnar mugu eisini gera sítt, siga landsstýrismenninir í fíggjarmálum og innlendismálum, sum á hvør sín hátt varða av kommunala sektorinum.

### Nýggjar roknskaparreglur

Landsstýrismenninir ásanna, at tørvur er á størri gjøgnumskygni og innliti í fíggjarviðurskiftini í kommunala geiranum.

– Í løtuni verður arbeitt við at gera nýggjar roknskaparreglur fyri kommunurnar í Føroyum. Hetta vil skapa størri gjøgnumskygni til fyrimun fyri bæði land og kommunur og samstundis hava stóran týdning tá samráðast skal um útreiðslukarm siga Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum og Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum.

# Landsstýrið skal sópa fyri egnum durum

**Heldur enn at leggja so harðliga eftir kommunum áttu landsstýrismenninir at brúkt nøkur av sínum egnum vápnum, um teir veruliga vilja tálma búskaparligu gongdini, sigur Rósa Samuelsen, forkvinna í Føroya Kommunufelag**

POLITIKKUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



*Rósa Samuelsen reksar upp øki, sum landið heldur átti at savnað seg um*

Seinastu dagarnar hava ákærurnar skolað niður yvir kommunurnar, tí hesar eru farnar undir eitt ósunt og skilaleyst íløguvirksemi, sum tikið hevur verið til. Skotið verður upp, at landsstýrið í størri mun skal inn at stýra kommununum. Hetta hevur fingið ilt í Føroya Kommunufelag, sum nú talar at og heitir á landsstýrismenninir um at hyggja at sínum egnu møguleikum at tálma búskapargongdini, heldur enn at ákæra kommunurnar fyri vanrøkt.

– Vit røkja bara okkara skyldur út frá givnum kørmum, sigur Rósa Samuelsen. Og hon vísir á, at um hugt verður nærri at, hvar íløgurnar fella, so er tó trupult at síggja, hví hesar íløgur ikki skulu gerast.

– Íløguvirksemið í eini kommunu er í nógv størri mun tengt at búskaparvøkstrinum, enn íløguvirksemið hjá landinum er. Kommunurnar virka innanfyri teir karmar, hægstu myndugleikar landsins hava stungið út í kortið. Hvørki meira ella minni. Tí tykist løgið, at landsstýrismaðurin við fleiri leggja so harðliga eftir kommununum, sigur forkvinnan í Føroya Kommunufelag.

### Menna samfelagið

Hon heldur tað vera trupult at síggja, hví íløgurnar ikki skulu gerast.

– Vit hava eitt uppgávubýti, ið ásetur okkara uppgávur. Eitt nú innan barnaansing, skúlaútbygging, útstykking og vegagerð, bróðurparturin á eldraøkinum og útbyggingar av kloakkskipanum og vatnveiting, sigur Rósa Samuelsen. Og hon staðfestir, at hetta eru øki, ið komandi árini fara at fylla meginpartin av íløgunum hjá kommununum.

– So ella so eru tær allar við at menna samfelagið og skapa fortreytir fyri, at føroyska samfelagið framyvir kann mennast og hava ein vøkstur búskaparliga eins væl og trivnaðarliga, og fleiri teirra eru beinleiðis avleiddar av lógarásettum krøvum, sigur hon og tekur eitt nú Leirvík fram sum dømi.

– Skal Leirvík til dømis siga nei til økta eftirspurningin, eftir at Norðoyartunnilin er latin upp? Og skal Gøta siga nei takk til eina handilsmiðstøð, ið kemur at geva fleiri enn 100 arbeiðspláss í kommununi? Við einum slíkum hugburði hevði øll menning í kommununum og harvið eisini landinum steðgað upp, sigur hon.

### Vendið skjútsinum

Og Rósa Samuelsen heitir á landsstýrismenninar um, heldur enn at leggja so harðliga eftir kommunum, at brúkt nøkur av sínum egnum vápnum, um teir veruliga vilja tálma gongdini. Hon reksar upp øki, sum landið heldur átti at savnað seg um. Eitt nú at tað framvegis verður latin rentustuðul til øll sethúsalán (ið bert hækka og hækka), hóast hetta hevur eina beinleiðis ávirkan á kostnaðarstøðið. At handverkarar uttanlands framvegis fáa sersømdir, hóast hendur mangla til arbeiðis í Føroyum. At skattalætti verður latin, hóast allar búskaparligar teoriir meta skattalætta í góðum tíðum sum eina óneyðuga stimbran av búskapinum. At byggingar og útbyggingar av ikki færri enn fimm av átta miðnámsskúlum eru settar í gongd, hóast tørvur er á handverkarum. At í Løgtingið í tíðarskeiðinum 2006-2008 hevur samtykt at brúka 51 milliónir til útbyggingar á eldraøkinum og at hetta helst gevur útbyggingar fyri væl oman fyri 200 milliónir samanlagt.